# Miðlamiarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

Í kvøld kemur ein sending sum eitur »Kaos i Skagen« . Hopi ikki hon er gjørd, tí eg havi verið har, hehe :)
**Kvinna, 35 ár**



*Børn, sum spyrja nógv, spæla ofta ov lítið, og smá skulu spæla fyri at mennast.*

Angela Petersen arbeiðir sum barnaráðgevi í Eysturoynni (Mánaðarblaðið)



*Kærleiki er einasta orsøk til, at mann skal gifta seg, og hevur mann onnur motiv, mugu tey fjalast.*

Fyrrverandi biskopurin Jan Lindhardt tosar um kærleika (24timer)



Gevst og gløð! Ja,tad er ein slikkipinnur í munninum
**Kvinna, 35**

*- Máltíðin í kvøld var avbera góð, nógv fitt fólk úr øllum Norðurlondum, men ikki bar eg eyga við Jóhonnu ella Jóninu.*

Jenis av Rana hevur verið til døgurða við samkyndum, men hann sá tær ongantíð (Portal.fo)

Koyr tey gomlu í fongslið og brotsmenninar á røktarheimið. So fáa tey gomlu atgongd til bað, frítíðarítriv og gongutúrar. Eingin stjelur frá teimum og tey fáa lummapengar… Brotsmenninir fáa kaldan mat, ongar pengar, sita einsamallir, ljósið verður sløkt klokkan 20 – og eru teir hepnir, sleppa teir í bað eina ferð um vikuna (leysliga umsett úr donskum, men hóskar til føroysk viðurskifti)
**Maður, 45 ár**



*Mínir spælarar vóru púra deyðir í skiftingarrúminum eftir dystin, simpelten deyðatroyttir.*

Barcelona-venjarin Josep Guardiola heldur ikki, at hann hevur spælt ímóti einum so fysiskum sterkum liði sum FCK í langar tíðir. (Ekstrablaðið)



*Hetta kvøldið endaði ikki soleiðis, sum vit høvdu vónað.*

Meg Whitman tapti guvernørvalið í Kalifornia, hóast hon brúkti 740 milliónir krónir uppá valstríðið (The Sun)

Skeldi inn á bilin. 7-ára gamla hyggur uppá meg, kelar meg á armin og sigur fittliga: Mamma næstu ferð, vit keypa bil, kunnu vit ikki keypa ein taxa ístaðin?
**Kvinna, 40 ár**

*Eg orki ikki fyri, tá fólk bara siga, at tey halda okkurt. Fakta skal vera upp á pláss.*

Hans Holm um at greiða frá fremmandum londum, hendingum og fólkasløgum (Sosialurin)

